Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 16.12.2020 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Jóhan Christiansen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | Uni Rasmussen, Tollakur Joensen, Hans Mourits Foldbo |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 97/20 | 20/00441-1 | 20/00441 - Serstøk byggisamtykt fyri B2 økið við Myllá í NG | 3 |
| 98/20 | 20/00391-3 | 20/00391 - Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 100c | 4 |
| 99/20 | 20/00431-3 | Mál nr. 20/00431 - Ummæli í samband við marknaumskipan matr. nr. 6a SG | 6 |
| 100/20 | 20/00389-2 | 20/00389 - Umsókn um marknaumskipan av matr. nr. 40 og 41 LV | 7 |
| 101/20 | 20/00439-1 | 20/00439 - Íbindingargjald í samband við útstykkingina við Myllá | 8 |
| 102/20 | 20/00421-1 | 20/00421 - Søla av vinnustykki nr. 4 í Gøtudali | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 103/20 | 20/00444-1 | Mál 20/444 (20/00240) Hølisviðurskifti hjá Framvit | 11 |
| 104/20 | 20/00216-4 | Mál 20/00216 Umvæling av lendingini í Syðrugøtu. Málslýsing og tilmæli. | 12 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar**

## 97/20 20/00441 - Serstøk byggisamtykt fyri B2 økið við Myllá í NG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 14.12.2020 | 49/20 | 20/00441-1 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 20/00441-1 |
| 3 Býráðið | 16.12.2020 | 97/20 | 20/00441-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Serstøk byggisamtykt skal gerast fyri útstykkingin við Myllá. Útsykkingin liggur í einum B2 økið við serstakari byggisamtykt. Umsitingin hevur í samráð við arkitektin arbeitt við at gera eina serstaka byggisamtykt, ið hóskar til útstykkingina.<br>Í stuttum, so inniheldur serstaka byggisamtyktin hæddarviðurskifti, frástøðu til mark (byggilinjur) v.m. Víst verður til skjal í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Kostnaðurin liggur um 40.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at samtykkja fyriliggjandi serstøku byggisamtykt fyri økið við Myllá í Norðragøtu. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 14. december 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at Ósbjørn Jacobsen kemur at greiða frá innihaldinum í serstøku byggisamtyktini áðrenn komandi býráðsfund.

**Býráðið 16. december 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, við tí ískoyti at um svali verður gjørdur út móti vegnum, skal girðingin verða gjøgnumskygd.

## 98/20 20/00391 - Umsókn um byggiloyvi á matr. nr. 100c

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 14.12.2020 | 51/20 | 20/00391-3 |
| 2 Býráðið | 26.11.2020 | 94/20 | 20/00391-3 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.11.2020 | 47/20 | 20/00391-3 |
| 4 Býráðið | 16.12.2020 | 98/20 | 20/00391-3 |

**Málslýsing:**

Ánari av matr. nr, 100c hevur søkt um loyvið at byggja eina hædd omaná verandi bilhús. Sí umsókn í málinum.

Verandi bygningur er eitt bilhús, har ætlanin er at byggja omaná bilhúsið og gera um til sethús.

Verandi bilhús er bygt í mark, men 1.hædd kemur at verða 2,5m frá marki.

Um umsóknin skal gangast á møti, má frávik gevast í samband við hæddarviðurskiftinum. Í Øki B-Bústaðarøki er mest loyvda hædd til yvirgrind 5 m og 8,5 m til møn. Í fyriliggjandi umsókn er hæddin á húsinum 6,7 m til hægsta punkt.

**Ískoyti: 10.12.2020**
Ein klaga kom, sama dag, sum málið skuldi viðgerast í býráðnum, tí bleiv málið tikið av skrá. Síðani er hoyring send til grannar. Víst verður til skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar fíggjarligar avleiðingar

**Tilmæli**

Mælt verður til at ganga umsóknini á møti.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. november 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 26. november 2020**
Málið tikið av skrá.

**<u>Byggi - og býarskipanarnevnd 14. december 2020</u>**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at a fylga tilmælinum hjá umsitingini.

**<u>Býráðið 16. december 2020</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 99/20 Mál nr. 20/00431 - Ummæli í samband við marknaumskipan matr. nr. 6a SG

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 20/00431-3 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 14.12.2020 | 52/20 | 20/00431-3 |
| 3 Býráðið | 16.12.2020 | 99/20 | 20/00431-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna er biðin at ummæla marknaumskipan á matr. nr. 6a í Syðrugøtu.<br><br>Matrikul nr. 6a skal selja 2 gyllin til matrikul nr. 35n í Syðrugøtu. Talan er um tvær gyllin, ið liggja á matrikul nr. 336a, hesar eru knyttar til matrikul nr. 6a í Syðrugøtu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at viðmæla nevndu marknaumskipan. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 14. december 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 16. december 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 100/20 20/00389 - Umsókn um marknaumskipan av matr. nr. 40 og 41 LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 20/00389-2 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 14.12.2020 | 53/20 | 20/00389-2 |
| 3 Býráðið | 16.12.2020 | 100/20 | 20/00389-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um marknaumskipan í Leirvík.<br>Matrikul nr. 40 skal selja 57m2 til matrikul nr.41 í Leirvík. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at viðmæla nevndu marknaumskipan. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 14. december 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 16. december 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

## 101/20 20/00439 - Íbindingargjald í samband við útstykkingina við Myllá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | | | 20/00439-1 |
| 2 Byggi - og býarskipanarnevnd | 14.12.2020 | 50/20 | 20/00439-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 14.12.2020 | 82/20 | 20/00439-1 |
| 4 Býráðið | 16.12.2020 | 101/20 | 20/00439-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Vísandi til mál nr. 19/00274, so bleiv tann 04.06.2020 samtykt at áseta eitt íbindingargjald á hvørt grundstykki. Hetta tí at Eysturkommuna skuldi gera felags reinsiverk til útstykkingina.<br>Eisini var samtykt at kostnaðurin fyri íbindingargjald, skal ásetast, tá samlaði kostnaðurin fyri reinsiverki er staðfestur.<br><br>Reinsiverkið kostar áleið 1.100.000 mió kr. Tí kann man seta gjaldið fyri íbinding á 20.000. kr. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at áseta eitt íbindingargjald á 20.000 kr. til hvørt grundstykki. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 14. december 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 14. december 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 16. december 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 102/20 20/00421 - Søla av vinnustykki nr. 4 í Gøtudali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 23.11.2020 | 45/20 | 20/00421-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.11.2020 | 78/20 | 20/00421-1 |
| 3 Býráðið | 26.11.2020 | 91/20 | 20/00421-1 |
| 4 Vinnunevndin | 14.12.2020 | 47/20 | 20/00421-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 14.12.2020 | 80/20 | 20/00421-1 |
| 6 Býráðið | 16.12.2020 | 102/20 | 20/00421-1 |

**Málslýsing:**

5 vinnustykkir vóru til sølu og av teimum eru 4 seld. Tað seinasta stykkið varð lýst til sølu tann 19 okt, 2020 og eru tað 3, sum hava svara at teir eru áhugaðir í at keypa stykkið. Víst verður til mál nr. 19/00541, 20/00013 og 20/00304.

Býráðið hevur tilskilar sær nakrar treytir við søluni s.s. slag av virksemi, fasada ímóti landsvegnum og hvussu virksemi hóskar til ætlanir og verandi virksemi.

**Ískoyti 09.12.2020**
Umsitingin hevur sent skriv til umsøkjarar, har biði var um tekningar og frágreiðing av virksemi, sum skal vera á økinum. Víst verður til mál nr. 19/00541, 20/00013 og 20/00304.
Ein av umsøkjaranum hevur svara, virksemi, hjá hesum hóskar til verandi og framtíðar virksemi á økinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til at avgerð verður tikin í býráðnum um hvør av áhugaðu keyparunum, fær tilskilað stykkið.

**Vinnunevndin 23. november 2020**
Vinnunvendin mælir til at umsitingin fær tekningar og frágreiðing av virksemi til støðutakan til komandi fund í vinnunevndini.

**Fíggjarnevnd 24. november 2020**
Málið tikið av skrá

**Býráðið 26. november 2020**
Málið tikið av skrá

**Vinnunevndin 14. december 2020**
Vinnunevndin mælir til at selja vinnustykkið nr. 4 í Gøtudali til umsøkjara við mál nr. 20/00013.

**Fíggjarnevnd 14. december 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Býráðið 16. december 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Vinnunevndini og fíggjarnevndini.

## 103/20 Mál 20/444 (20/00240) Hølisviðurskifti hjá Framvit

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 16.12.2020 | 103/20 | 20/00444-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið skriv frá skjúlastjóranum fyri Framvit, og frá mentanarleiðaranum í Fuglafjarðar kommunu, har heitt verður á Eysturkomunu at taka málið viðv. útbygging av Framvit til viðgerðar.<br><br>Eitt skriv/uppskot frá borgarstjóranum, Jóhan Christiansen, er at heita á komandi býráð at taka málið upp til viðgerðar beinanveg, og fáa semju partana milllum um fíggingarleist. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Býráðið 16. december 2020**

Einmælt samtykt at heita á komandi býráð um at taka máli upp til viðgerðar við tað sama.

# 104/20 Mál 20/00216 Umvæling av lendingini í Syðrugøtu. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 15.09.2020 | 31/20 | 20/00216-4 |
| 2 Vinnunevndin | 14.12.2020 | 49/20 | 20/00216-4 |
| 3 Fíggjarnevnd | 14.12.2020 | 81/20 | 20/00216-4 |
| 4 Býráðið | 16.12.2020 | 104/20 | 20/00216-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Býráðið setti 250.000 kr. av til lendingina í Syðrugøtu í 2020. Okkurt smávegis arbeiði gjørt, s.s. tikið grót úr botninum í innasta horninum á lendingini, keypt nýggjar teymar og skerellispannir.<br><br>Eysturkommuna hevur fingið tær gomlu tekningarnar av lendingini frá Landsverk. Áhugaverdu tekningarnar vísa søguna heilt aftur til tann fyrsta pirin í 1928, og hvussu øll lendingin er gjørd í fleiri umførum.<br><br>Eysturkommuna hevur biðið LBF gjørt eina støðumeting av lendingini. Umframt generellu støðumetingina, er uppskot til ábøtur, eitt notat um el-innleggingar og til síðst hava teir gjørt ein uppmátingarplan av lendingini og nærmasta økinum.<br><br>Nú má hædd takast fyri, hvat kommunan vil við hesari verkætlanini. Skulu vit bara umvæla sjálva lendingina, ella skulu vit taka alt økið sum heild?<br>Er talan bert um ábøtur á tað sum veður og vindur hava slitið við tíðini, ella skal økið gerast meira hugnaligt? Skulu bátadráttarnir takast við í projektið?<br>Hvussu skulu ábøturnar fremjast? Verða umvælingarnar gjørdar í stigum ella skal alt gerast í einum.<br><br>**Ískoyti 10.12.2020**<br>Vit hava móttikið kostnaðarmeting frá LBF. Víst verður til skjal "*Prosjektuppskot - kon og el*"í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 250.000 kr eru settar av á fíggjarætlanini 2020 til lendingina í Syðrugøtu. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at LBF teknar eitt liðugt projekt, við kostnaðarmeting. Er áhugi fyri hesum, má avgerð takast um hvussu farast skal fram, við eitt nú um verkætlanin skal gerast í byggistigum yvir fíggjarár. |

**Vinnunevndin 15. september 2020**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at LBF ger eitt liðugt projekt. Vinnunevndin mælir til at fáa kostnaðin av at gera projektið fyrst. Vinnunevndin ynskir at fáa prísin fyri arbeiðið at gera verkætlanina – 1) bert lendingin 2) lendingin og bátadráttar.
Vinnunevndin ynskir at havast skal í huga um hendan verkætlanin flættast saman við verkætlanina framvið við Syðrugøtusandi.

**Vinnunevndin 14. december 2020**
Vinnunevndin mælir til at verkætlanin verður gjørd klár til útbjóðing og at peningurin verður funnin á verandi játtan.

**Fíggjarnevnd 14. december 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini, og peningurin sum restar í verður tikin av konto 6.11.32.510-10 (Fríðkan- Syðrugøtusandur)

**Býráðið 16. december 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini.

fundurin lokin

Jóhan Christiansen

Brandur Jacobsen

Árni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Tollakur Joensen

Hans Mourits Foldbo

Gudny Langgaard

Uni Rasmussen

Hanna Jensen